## Tannlæknastovan í Hvalvík skift eigara

Eiðis kommuna hevur selt Tannlæknastovuna í Hvalvík

Fyri fimm mánaðum síðani keypti Eiðis kommuna Tannlæknastovuna í Hvalvík, men nú hevur bygdaráðið samtykt at selja hana aftur.

Tað er Oddmar Færø, sum hevur keypt Tannlæknastovuna, og Eiðis kommuna hevur gjørt ein tvey ára sáttmála við hann um tannrøkt til skúlabørn í kommununi. Tað skrivar heimasíðan hjá kommununi.

Eiðis kommuna keypti Tannlæknastovuna í Hvalvík fyri smáar tvær mió. krónur. Sunda kommuna bjóðaði eisini.

# Onga ábyrgd fyri um

**Stjórin á Tilbúgingarstovninum, Anni á Hædd, sigur, at Tilbúgvingarstovnurin ikki hevur ábyrgd fyri umhvørvinum, tá óhapp henda á sjónum. Umhvørvisvernd á sjónum er óskipað, tí landstýrið ikki hevur raðfest eina tilbúgvingarætlan, staðfestir hon.**

OLSHANA
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

– Tilbúgvingarstovnurin hevur ikki ábyrgd av umhvørvinum, vit skulu bjarga skip og manning. Hetta vita politikarnir, tí bæði tilbúgvingin og havumhvørvið eru yvirtikin undir sitandi løgtingið.

Hetta sigur Anni á Hædd, stjóri á Tilbúgvingarstovninum, sum hevur verið í andgletti eftir Olshanu óhappið. Fjølmiðlarnar hava sett spurning við, um hon tók tær røttu avgerðirnar, tá Olshana varð togað av Flesjunum, uttan at oljan var tómd úr skipinum. Og tinglimur hevur sett spurning við fakligu førleikarnar hjá stjóranum.

Men Anni á Hædd heldur fast um, at uppgávan hjá Tilbúgvingarstovninum varð loyst til lýtar eftir tí málsetningi, sum stovnurin hevur og undir teim umstøðum sum vóru.

– Okkara uppgáva er fyrst og fremst leiting og bjarging. Tað er tað vit skulu metast eftir, og her er onki at kritisera í samband við Olshanu óhappið, sigur stjórin á Tilbúgvingarstovninum.

– Føroyar hava eina góða tilbúgvingarætlan, tá um ræður leiting og bjaring. Havumhvørvisverndin hongur hinvegin í leysari luft. Vit hava eftirspurt eina yvirskipaða tilbúgvingarætlan, og vit hava bjóðað okkum fram at samskipa fyrireikingina, men tað hevur verið trupult at fáa avvarandi landstýrismenn at binda seg til tilgongdina, sigur Anni á Hædd.

– Frammanundan Olshanu óhappinum var eingin politikari upptikin av, at umhvørvisparturin í tilbúgvingini var óskipaður. Í juni mánað fingu vit tó grønt ljós frá innlendismálaráðnum, og vit vóru farin í gongd við at fyrireika fundir.

Men so hendi óhappi við



## Havumhvørvislóg uttan tilbúgvingarætlan

Stutt fyri at lógin um verju av føroyska havumhvørvinum kom í gildi í Føroyum í 2005, staðfesti táverandi landsstýrismaður í umhvørvismálum, Jógvan við Keldu í lesarabrævi, 1. februar 2005, at fyritreytin fyri einum reinum og ríkum havumhvørvi var, at land og kommunur høvdu eina tilbúgvingarætlan, sum arbeitt verður eftir í sambandi við dálkingaróhapp.

– Eitt er vist, tað er ov seint at fara at bíleggja basingarútgerð uttanlands, tá óhappið er hent. Tí vil eg sum landsstýrismaður í umhvørvismálum heita á Fiskimálaráðið og kommunurnar um at seta tilbúgvingina á dagsskrá. Bíligari og betur er at vera fyrivarin enn eftirsnarin, segði táverandi landsstýrismaður í umhvørvismálum.

Tilburðurin við Olshanu hevur varpað ljós á, at Føroyar enn onga tilbúgvingarætlan hava á havumhvørvisøkinum.

## Grønland hevur tilbúgvingarætlan

Grønland hevur síðani í januar í ár havt eina tilbúgvingarætlan fyri umhvørvisdálking.

Grønlendska tilbúgvingarætlanin er býtt í tveir partar. Fyrri partur er strategiskur og útgreinar fyrisitingarliga ábyrgdarbýti, møguligar virkisætlanir og avmarkaða orkuføri. Seinni partur er ein handbók, sum skal brúkast, tá ólukkan er hend. Hon útgreinar, hvør ger hvat, og hvør skal kunnast nær.

Tilbúgvingarætlanir byggja á bæði tørvsgreiningar og politiska raðfesting. Grønlendska tilbúgvingarætlanin staðfestir, at Grønland uttan hjálp uttanifrá skal vera ført fyri at taka sær av oljuútláti upp til 20.000 litrar. Tá størri óhapp henda, skal grønlendska tilbúgvingin vera før fyri at gera arbeiðið við útgerð úr Danmark